Eldraráðið í Tórshavnar kommunu
Tórsgøta 21, 100 Tórshavn
eldrarad@torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Eldraráðið 2021 – 2024

| | |
|---|---|
| Fundur: | Nr. 9 |
| Tíð: | 17.06.2021 kl. 13.00. |
| Stað: | Tilhaldið í Tórsgøtu |

**Møtt:** Katrin Holm, forkvinna, Julianna Klett, kassameistari, Marin Rasmussen, limur, og Petur Rouch, skrivari.

Tað lá ikki fyri hjá Bjørghild Djurhuus at møta. Ístaðin fyri hana møtti Ingigerð á Trøðni, fyrstvaldi varalimur.

**Fundarskrá:**

1. Fundur við umboð fyri Vágs kommunu
2. Samanumtøka av avtalum við Eldraráðið í Vági
3. Pensjónistafelagið í Tórshavn inn í Tilhaldið
4. Ymiskt

AD 1 Fundur við umboð fyri Vágs kommunu

10. juni 2021 vitjaði Eldraráðið suðuri í Vági. Tað lá ikki fyri hjá Katrini at koma við, so ístaðin kom Ingigerð við suður.

Fundur var við umboð fyri býráðið í Vági. Talan var um Bjarna Johansen, borgarstjóra og Magnus Mørk Hjelm, formann í sosialu nevndini.

Fregnast var um bygging av lutaíbúðum. Upprunaliga var ætlanin at byggja 16 íbúðir, 8 vesturi í Bø og 8 uttarlaga í bygdini. Magnus kundi upplýsa, at nú var talan um 6 lutaíbúðir á 90 kvadratmetur. Kommunan letur lendi og tekur sær av klárgering, men annars tekur Bústaðir sær av byggingini saman við privatum. Væntandi verða íbúðirnar klárar at flyta inn í um eitt ár.

Kommunan hevur annars ætlanir um at byggja eldraíbúðir, men staðfestingin er enn ikki komin uppá pláss.

Annars standa 60 tóm hús í bygdini.Tey flestu vera nýtt til frítíðarbústað og til Airbnb. Men húsaprísirnar eru hækkandi og fyri stuttum var ein av ”smáttunum” seld fyri 1,2 milliónir.
Vágs kommuna hevur ”avlop” á játtanini til búð- og heimatænastuna, meðan hinar kommunurnar í syðru helvt av oynni hava hall. Vágs kommuna er í samráð við kommunurnar, so avlopið kann flytast kommunum við halli ímóti, at pengarnir verða nýttir at keypa tænastur til fólk, sum ”fella uttanfyri aldursmarkið".

Eitt Eldraráð er fyri allar kommunurnar í Suðuroynni. Vágur hevur tvey umboð og somuleiðis Tvøroyri, meðan hinar kommunurnar hava eitt umboð hvør í ráðnum.

Ætlanin var eisini at vitja á Hamragarði, men tá lá ikki fyri vegna Covid-19.

AD 2 Samanumtøka av avtalum við Eldraráðið í Vági

Eftir fundin við umboð fyri Vágs býráð var fundur við Vágs Pensjónistafelag. Tey vit hittu vóru Ingeborg Vinther, forkvinna, saman við Alfridu Djurhuus og Vigerd Vestergaard.

Tosað var um størri samstarv millum eldra- og pensjónistafeløg í øllum landinum.Við at hittast regluliga kunnu vit gera vart við okkara sjónarmið í mongum samanhangum og hervið gerast sjónligari enn í dag,

Eisini varð tosað um virðingina fyri teimum eldru, sum búgva á stovni. Stovnurin er teirra heim, og tey rinda fyri at búgva har, men afturmeldingar frá summum er ofta, at sjálvræði teirra verður skert - viðhvørt munandi. Hesi viðurskifti eiga at vera tikin upp, møguliga gjøgnum tey, sum vara av teimum, ið búgva á stovni.

AD 3 Pensjónistafelagið í Tórshavn inn í Tilhaldið

Pensjónistafelagið í Havn hevur vent sær til Eldraráðið og biðið um økt samstarv. Fyrispurningur er komin um at sleppa at hava okkara høli til fundir.Hetta eiga vit at taka væl ímóti. Sum er hittast limirnir í KFUM hvørt mikukvøld. Hetta kann eins væl vera í Tilhaldinum, um tey fáa loyvi til tess.

AD 4 Ymiskt
Tiltøkini í Tilhaldinum eru nú sett at byrja tann 26. august 2021 klokkan 19:30.
Eitt nýtt evni var nevnt at taka við á skránna seinni í ár. Alfred Olsen plagar at greiða frá lógarverkinum um fólkapensjón á sera greiðan og lættfatiligan hátt. Vit eiga at heita á hann um at halda ein fyrilestur um hetta í Tilhaldinum.

Vit eiga at kanna møguleikan fyri at savna øll Eldraráðini í Føroyum til eitt kvøld saman í - til dømis - Reinsarínum.

Fundur lokin klokkan 14:30

Næstu fundur verður 1. juli 2021.

Tórshavn tann 17.06.2021.

Petur Rouch,
skrivari